# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
fartekst@mail.dk
tlf 341800

*Natascha heldur seg hava rætt til ognirnar hjá Primkopil (sakførari hennara).*

# Vil hava húsini hjá burturflytaranum



*Natascha Kampusch krevur allar ognirnar hjá burturflytara sínum í endurgjaldi.*

**Natascha Kampusch krevur nú at fáa húsini, sum hon sat fangi í. Hon vil eisini hava hinar ognirnar hjá burturflytaranum.**

Tann 18 ára gamla Natascha Kampusch vil hava endurgjald fyri tey átta árini, hon sat fangi heima hjá Wolfgang Priklopil. Hon og sakførari hennara hava gjørt av, at hon skal krevja at fáa húsini hjá burturflytaranum.

Wolfgang Priklopil átti ikki bara húsini, sum hann búði í. Hann átti eisini 24 prosent av fyritøkuni, sum hann arbeiddi hjá, og harafturat átti hann tveir bilar. Einasti arvingur er mamman, men sakøfrarin hjá Nataschu Kampusch væntar ikki, at hon fer at seta seg upp ímóti, at gentan arvar ognirnar. Í øllum førum fer hann at biðja dómsvaldið lata henni allar ognirnar hjá burturflytaranum.

-Eg vænti ikki, at mamman fer at mótmæla. Tað snýr seg um at geva Nataschu endurgjald fyri líðingarnar, sigur Gunter Harrich, sakførari.

Sambært eysturríkskum fjølmiðlum eru húsini hjá Wolfgang Priklopil hálva aðru millión krónur verd, men tað er ikki greitt, um Natascha Kampusch ætlar sær at selja tey, um hon fær tey. Royndirnar vísa annars, at tað kann vera trupult at selja eini hús, sum hava verið brúkt til burturflyting og onnur lógarbrot.

# Sveis skakað av barnaneyðtøku

**Tveir dreingir, 13 og 11 ára gamlir, neyðtóku eina fimm ára gamla gentu.**

Tað var ein dag í juni, at teir báðir dreingirnir lokkaðu ta fimm ára gomlu gentuna við sær á einum parkeringsplássi, har teir neyðtóku hana. Løgreglan hevur dult tilburðin, men teir seinastu dagarnar hava sveisisk bløð gjørt nógv burtur úr tíðindunum.

Sveisisku myndugleikarnir hava ikki tikið støðu til, hvussu teir báðir dreingirnir skulu revsast. Tað kriminella aldursmarkið í Sveis er 15 ár, og myndugleikarnir kunnu tí ikki draga dreingirnar í rættin. Teir eru tiknir úr skúlanum og fluttir út grannalagnum, sum teir og gentan búðu í.

Sveisiska ráðgevingarstovan fyri børn og ung sigur við bløðini, at tað er vorðið meiri vanligt tey seinastu árini, at tað eru børn niðan fyri tann kriminella lágaldurin, sum misbrúka yngri børn.

## STUTT SAGT

### Deyðarevsing fyri neyðtøku og morð

Forsetin í Peru, Alan Garcia, hevur skotið upp at broyta landsins grundlóg, so deyðarevsing kann setast í gildi aftur. Forsetin sigur, at eftir hansara tykki eigur deyðarevsing at galda fyri tey, sum neyðtaka børn og síðani beina fyri teimum.

Uppskotið hevur elvt til øsing í Peru, og fleiri mannarættindafelagsskapir eru harðliga ímóti, at landið skal seta deyðarevsing í gildi, nú so mong onnur lond hava sett deyðarevsing úr gildi. Uppskotið tykist heldur ikki hava stórvegis møguleikar í Kongressini, tí har er greiður meiriluti ímóti tí. Hinvegin vísir ein meiningakanning, at heili 92 prosent av kvinnunum í Peru taka undir við uppskotinum hjá forsetanum.

Alan Garcia noyddist at flýggja úr Peru í 1990, tá hann bleiv lagdur undir svik. Hann hevði tá verið forseti í fimm ár, og landsins búskapur lá í sori. Í 2001 kom hann heimaftur, og nú er hann aftur forseti. Hesaferð hevur hann lagt á annan bógv við búskaparpolitikkinum, og fyri at vísa tað í verki hevur hann skarvað meiri enn helmingin av sínari egnu forsetaløn.

### Útlit fyri friði í Uganda

Í Uganda hevur Yoweri Museweni, forseti, givið herinum boð um at gevast við bardøgunum við uppreistrarherin Harran Mótstøðuher, og tað hevur givið fólkinum í tí illa krígsherjaða landinum vónir um frið, skrivar Reuters.

Museweni sigur, at stjórnin er sinnað at samráðast við Harrans Mótstøðuher, men treytin er, at uppreistrarherurin savnar sínar hermenn í tveimum legum har suðuri í grannalandinum Sudan. Samstundis skal ugandiski stjórnarherurin tryggja, at fólk, sum eru flýdd undan bardøgunum, sleppa at flyta heimaftur. Hildið verður, at umleið tríggjar milliónir fólk eru rýmd frá húsi og heimi í borgarakrígnum í Uganda.

Harrans Mótstøðuherur er tiltikin fyri sín harðskap, og tað er eisini alment kent, at hann hevur burturflutt fleiri túsund børn. Teir flestu dreingirnir hava verið brúktir sum hermenn, og nógvar gentur hava verið noyddar at virka sum stuttleikagentur hjá hermonnunum.

### Kamelmjólk sum viagra

Í indiska landspartinum Rajasthan er eftirspurningurin eftir kamelmjólk fleirfaldaður, eftir at ein 88 ára gamal maður gjørdist pápi herfyri. Hann heldur uppá, at tað var kamelmjólkini fyri at takka, at hann var førur fyri at útinna eitt slíkt bragd á gamalsaldrinum.

Bløðini skriva, at fleiri túsund menn hava staðið í bíðiröð teir seinastu dagarnar at keypa kamelmjólk, sjálvt um læknarnir siga tað vera heilt óhugsandi, at kamelmjólkin hevur ta ávirkan, sum tann 88 ára gamli vil vera við.

Tey, sum selja kamelmjólk, eru í góðum hýri, tí prísurin á mjólkini er hækkaður nógv, nú eftirspurningurin brádliga er vaksin so nógv.

